FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208

Tórshavn, tann: 24. november 2021
J. nr.: 21/23426
Viðgjørt: MJ

Svar uppá fyrispurning nr. 52-082/2021 frá Tordi Niclasen, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um fráfaringaraldur á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

Nær kann roknast við, at landsstýrismaðurin broytir galdandi mannagongd um fráfaringaraldur á almenna arbeiðsmarknaðinum og fremur nýggjar ásetingar hesum viðvíkjandi ?

Svar
Arbeitt verður í løtuni við at hækka fráfaringaraldurin úr 70 ár upp í 72 ár, bæði fyri sáttmálasett starvsfólk og fyri tænastumannasett. Hetta merkir, at fólk fáa møguleika at arbeiða longri, um tey ynskja tað. Men tað er ikki nakað krav, tí fólkapensjónsaldurin verður óbroyttur.

Tænastumenn
Í mun til arbeiðið við at broyta fráfaringaraldurin hjá tænastumonnum umhugsar landsstýrið eisini at gera aðrar broytingar í tænastumannalógini og tænastumannaeftirlønarlógini. Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur tí bjóðað teimum fakfeløgum, ið hava samráðingarrætt fyri tænastumenn, á tveir fundir fyri at umrøða ætlanirnar hjá landsstýrinum og at hoyra, hvat feløgini meina um ætlanirnar hjá landsstýrinum. Niðurstøðan á hesum báðum fundum hevur m.a. verið, at tað var bara eitt felag, ið tók undir við at fráfaringaraldurin hjá tænastumonnum verður hækkaður til 72 ár. Hini 5 feløgini taka ikki undir við at hækka fráfaringaraldurin.
Tað hevur sostatt ikki borið til at fingið semju við avvarðandi fakfeløg um at hækka fráfaringaraldurin hjá tænastumonnum. Landsstýrið ætlar tó framvegis at fremja hetta mál og fer í hesi tingsetuni at lata løgtinginum eitt lógaruppskot við broyting um at hækka fráfaringaraldurin hjá tænastumonnum úr 70 ár upp í 72 ár.

Sáttmálasett starvsfólk
Í rundskrivi frá 2007 bleiv fráfaringaraldurin hjá alment sáttmálasettum starvsfólkum hækkaður úr 67 ár upp í 70 ár. Í rundskrivi frá 2013 bleiv tað gjørt møguligt hjá arbeiðsgevarum at leingja setanina, eftir at starvsfólk hava fylt 70 ár. Hetta verður gjørt við at seta starvsfólkið í eitt upp í tvey ára tíðaravmarkað starv.

Ætlanin hjá landsstýrinum var at broyta rundskrivið frá 2013 um fráfaringaraldur um somu tíð sum fráfaringaraldurin hjá tænastumonnum bleiv broyttur í tænastumannalógini.

LØGMANSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Havandi í huga, at nógv tann størsti parturin av starvsfólkunum hjá landinum eru sáttmálasett, ætlar landsstýrismaðurin ístaðin at broyta rundskrivið fyrst. Arbeitt verður við at seta eitt nýtt rundskriv í gildi fyrst í komandi ári, eftir at tað hevur verið í hoyring hjá viðkomandi pørtum, har fráfaringaraldurin hjá sáttmálasettum verður hækkaður til 72 ár, umframt at tað framhaldandi verður møguligt hjá arbeiðsgevarum at leingja setanina upp til 2 ár í senn, aftaná at starvsfólk hava fylt 72 ár.

Tinganes, 24. november 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum